## Kirkja fyllir

Sunnudagin 2. november, sum eisini er Alla halganna sunnudagur verður hátíðargudstænasta í Hoyvíkar kirkju, nú eitt ár er liðið síðani kirkjan varð vígd – 4. november í fjør. Við hesa gudstænastuna fer Jógvan Fríðriksson, biskupur at prædika, og aftaná bjóðar kirkjuráðið til ein kaffimunn.



## Síðsta freist til jólabørnini

Aftur í ár verður høvið hjá føroyskum børnum at lata gávur til børn í øðrum londum. Sunnukvøldið 26. oktober verður eitt familjumøti í Ebenezer, har fokus verður sett á hetta tiltakið "Operation Christmas Child". Hetta er eitt tiltak, har serliga børnini í sunnudagsskúlanum hava samlað jólagávur saman til børn aðrastaðni í heiminum, ið ikki fáa aðrar gávur. Gávurnar verða pakkaðar í skógvaeskjur. Sunnukvøldið koma so øll børnini við gávunum, ið verða samlaðar saman og sendar til Danmarkar, har tær fara víðari. Í øðrum samkomum verður eisini gjørt eitt stórt arbeiði at savna hesar serstøku skógvaeskjurnar inn.

# Virkin prestur við 70 yrkingum

**Hóast hann komandi ár fer um tey seksti, heldur tað ikki vágapresti, David Johannesen aftur í at skriva, bæði prædikur, sálmar – og eisini skaldsøgu. Nú er nýtt yrkingasavn latið úr hondum hansara**

BØKUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Miðvágur:** At presti dámar væl at skriva, hevur hann onga orsøk at dylja.

David Johannesen hevur áður ríkað mentanarlív okkara við nógvum sálmum, lestrum og søguligum tilfari.

Og nú hevur hann gjørt tað enn einaferð.

Herfyri kom út eitt yrkingasavn, ið ber heitið »70 yrkingar«. Av hesum eru 60 sálmar og 10 sangir.

- Mær dámar sera væl at yrkja, sigur vágaprestur.

Yrkingasavnið er útgivið á forlagnum »Vón« í Miðvági.

### Skaldsøga

Tá sagt verður at talan er um eitt nýtt yrkingasavn, so er hetta bert partvíst rætt:

Fyri júst 10 árum síðani kom nevniliga hetta sama yrkingasavnið út undir sama navni. Tá varð savnið vígt minninum um Ejvind Vilhelm, biskupi sála.

Nú verður hetta yrkingasavnið givið út aftur við ávísum rættingum og broytingum í tekstinum. Allir hesir 60 sálmarnir og 10 yrkingarnar eru yrktar til løg, sum í stóran mun eru kend millum sangarar.

Umframt hetta yrkingasavnið, sum er tað fimta í røðini, hevur David eisini fyri stuttum givið út eina bók um trúbótarmannin mikla, Martin Luther.

Ikki nóg mikið við tað, tí David hevur nevniliga eina aðra spennandi ætlan, sum nú skal førast út í lívið:

- Eg ætli mær at skriva eina skaldsøgu sum skal koma út komandi ár.

- Hetta verður ein skaldsøga, har spurningarnir í tilveruni hjá menniskjuni skulu lýsast, sigur David Johannesen.




*Vágaprestur David Johannesen lat herfyri út eitt yrkingasavn við heitinum »70 yrkingar«. Hann er í løtuni í ferð við at skriva eina skaldsøgu*



# Ikki lætt at vera avvarðandi

**Mánadagin byrjar eitt skeið fyri fólkum, sum liva tætt at einum rúsmisnýtara. Tað er Blái Krossur, ið skipar fyri**

SKEIÐA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

– Tað er ikki lætt, tá ein tú kennir er rúsevnismisnýtari, staðfestir fráhaldsfelagsskapurin.

Fyri tey er líkamikið um talan er um foreldur, systkin, børn ella onnur, sum tú kennir: Misnýtslan rakar í øllum førum tann avvarðandi sera hart.

- Tað ringasta er helst tað, at tann avvarðandi ongan hevur at tosa við, og ongan sum skilir støðuna!

Tí er Blákrossheimið farið undir at skipa fyri skeiðum fyri tey avvarandi, soleiðis at hesi eisini kunnu fáa neyðugu hjálpina.

Hetta komandi skeiðið byrjar mánadagin og heldur fram til mikudagin í næstu viku.

### Royndir og trupulleikar

Á skeiðinum greiða ymisk fólk frá teirra lívi sum avvarðandi hjá misnýtarum. Ráðgevar og sálarfrøðingar og onnur fara somuleiðis at halda fyrilestrar um sera viðkomandi evnir.

- Hesi hava drúgvar royndir við at vegleiða og ráðgeva avvarðandi í teirra truplu støðu, sigur Blái Krossur.

Umframt hetta verða bólkasamrøður, har luttakararnir sita saman í bólki við fólkum, sum hava verið í somu støðu sum tey sjálvi.

Hetta er eitt sera gott forum, har alt er loyvt at siga, og øll skilja tað, sum verður sagt.

Skeiðið er fyri øll, sum eru avvarðandi hjá misnýtarum á ein ella annan hátt.

Meir fæst at vita um skeiðið við at venda sær til Blákrossheimið á tlf. 315575 ella við at hyggja á heimasíðuna www.blakross.fo